## Fyrsti tveymálsskjúttin

Hóast oddalið ofta hava onkran málslúkin á liðnum, so er GÍ nakað ótypiskt í so máta. Soleiðis er Gunnar Nielsen fyrsti GÍ-spælarin, sum hevur skotið meira enn eitt mál í sama dysti higartil í ár.

Og yvir høvur eru málini hjá GÍ sera javnt býtt. Ikki færri enn 13 spælarar hava skotið tey 21 málini, sum liðið hevur fingið í landskappingini. Av hesum hevur Gunnar nú skotið fimm.

**-mørk**



## Svimjikapping í Danmark

Føroyskir svimjarar tóku herfyri lut í donsku DÅM2006 kappingini. Frá venjarunum á ferðini verður sagt, at føroysku svimjararnir stóðu seg heilt væl, og fremstu føroysku svimjararnir vóru avgjørt ikki langt aftan fyri teir bestu í Danmark.

Tann føroyingurin, sum stóð seg best, var Høgni Miné Rasmussen úr HS, sum vann kappingina í 200 metra rygg, meðan talan gjørdist um silvur á 100 metra teininum.

**-mørk**

HB-GÍ 1-2 (0-2):

# Verjuvillur kostaðu



HB



GÍ



**GÍ er nýtt oddalið í Formula-deildini. Gestirnir vóru bæði grammari og skilabetri, tá teir mikukvøldið sendu eitt ókonsentrerað HB-lið av oddasessinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kontrastirnir vóru øgiligir, tá dómarin hevði bríksláð fyri seinastu ferð. Gøtumenn hálsfevndust og runnu yvir til trúføstu áskoðararnar. Vertirnir høvdu hinvegin ongan hug at taka lut í fagnaðinum. Teir vistu – sum var – at teir høvdu mist oddasessin, og allir sum ein gingu teir at kalla beina leið inn í skiftisrúmið.

Sum so høvdu teir í HB eisini alla orsøk at vera ónøgdir. Fyrst og fremst tí teir høvdu mist oddasessin, men eisini tí tapið í fleiri mátar taldist millum tey heldr óneyðugu. Óneyðugt, tí talan í báðum førum var um persónligar villur, tá Gunnar Nielsen skeyt tey bæði GÍ-málini, og kanska serstakliga tí viljin hjá spælarunum at vinna og stríðast ikki gjørdist sjónligur, fyrr enn ov seint var.

### Grammir

Tá hetta er sagt, so skal tó leggjast afturat, at gøtumenn avgjørt spældu síni kort rætt. Frá fyrsta bríksli løgdu teir seg høgt upp á HB-liði, soleiðis at eitt veruligt trýst kundi skapast. Hvørt tað var vantandi virðingin frá mótstøðuni, ella um tað bara var kalda lotið og regnið, ber illa til at siga, men í øllum førum trivust HB'arnir sera illa fyrstu trý korterini.

Bólttapini á miðvøllinum vóru óvanliga nógv í tali, og í verjuni vóru villur ella beinleiðis sjusk í fleiri førum um at kosta fleiri enn tær báðar ferðirnar, sum GÍ fekk mál upp á. Fyrru ferðina var Svenn F. Jacobsen alt annað enn ansin við bóltinum, og tá Gunnar so slapp at reka og reka og reka, sendi hann flatt í netið av brotsteigarmarkinum.

Seinnu ferðina var Rasmus Nolsøe óskettin við avlevering, og so streyk argentinin aftur avstað. Hesa ferð fekk Tróndur Vatnhamar í fyrstu syftu sligið skotið á stólpan. Í aðru atløgu stóð maður á strikuni at verja fyri skotinum frá Símun Louis Jacobsen, men í triðju royndini beyð ikki bøtur.

### Skilagóðir

Í løtunum upp til seinna GÍ-málið, var HB annars byrja at trýsta GÍ, men sjáldan gjørdist talan um vandamikið trýst. Einamest tí gøtumenn í Magna Jarnskor, Sámal Joensen og eisini Kaj Ennigarð áttu menn, sum alla tíðina megnaðu at halda høvdið kalt. Tí kundi bólturin ofta spælast – heldur enn sparkast – úr trýstinum, og alt annað líka verður andarúmið hjá verjuni tá nakað væl størri.

Beint undan steðginum fekk HB gyltan møguleika at koma aftur í dystin, men einsamallur við málverjanum skeyt Jákup á Borg alt ov spakuliga, og tí kundi bólturin ruddast, áðrenn hann rullaði um strikuna.

Eftir steðgin dúvaði GÍ skilliga meira upp á verjupartin og kontraálop.

## Byrjaðu ov illa

Krzysztof Popczynski duldi ikki fyri, at hann ikki var nøgdur um samlaða avrikið, sum hansara spælarar sýndu mikukvøldið.

– Tað ert tú jú sjáldan, tá tú tapir. Serliga fyri steðgin haldi eg ikki, at vit spæla nóg væl, og málini tykjast eisini vera úrslit av persónligum mistøkum, men eg vil ikki peika nakran út her og nú.

– Eftir steðgin haldi eg tó, at vit spæla betri. Tá vísa spælararnir tann hugburðin, sum roknast kann við, men vit klára tó ikki at venda gongdini. GÍ hevur jú eina serstakliga góða verju, og teir eru vist eisini tað liðið, sum hevur latið fægst mál inn, og tá er ikki lætt at koma aftur.

Seinastu vikurnar hevur HB-venjarin vekslað nógv millum ymsu spælararnar. Kanska nóg so náttúrligt, nú skráin hjá HB er somikið strævin, men hetta er tó ikki týdningarmesta orsøkin sambært venjaranum.

– Sjálvandi er skráin hørð. Sunnudagin spæla vit í Letlandi og mikukvøldið er dystur í Klaksvík, so tað kostar nógvar kreftir. Hinvegin, so havi eg nógvar góðar spælarar í hópinum, og eg vil halda hesar í góðum formi. Og besti hátturin at gera hetta, er at læta menninar spæla dystir, heldur HB-venjarin.

**-mørk**

## Framvegis ein í senn

GÍ-spælararnir vóru sum vera man sera væl nøgdir, tá teir komu úr skiftirúminum í HB-húsinum. Fyri fleiri teirra var talan um fyrsta sigurin í Gundadali yvirhøvur, og sum bonus førdi hesin sigurin oddasessin við sær.

– Um tú spyrt meg, nær vit vunnu her seinast, so veit ikki heilt. Men tað skal eingin ivi vera um, at vit komu her eftir sigrinum, segði Áslakur R. Petersen.

Tað sá út til, at tit løgdu hart út í eini roynd at taka HB á bóli?

– Ja. Og tað var eisini ætlanin. Vit vildu taka teir hart og kontant, og tað haldi eg eisini eydnaðist sera væl fyri steðgin.

Tit hava støðugt tosa um at taka ein dyst í senn, men nú eru tit so fremstir. Er tað ikki nakað, sum tit onkursvegna byrja at hugsa um?

– Tað gera vit kanska onkra staðni í bakhøvdinum, men tað er so ikki ætlanin. Vit taka framvegis ein dyst í senn, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur. Eru vit framvegis fremstir, tá 27 umfør eru farin, kunnu vit kanska tosa um FM!

**-mørk**

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-GÍ 1-2 (0-2)**
**Dómari:** ***Dagfinn Olsen***
**HB:** Tróndur Vatnhamar – Mortan úr Hørg, Svenn F. Jacobsen (Johan Ejvind Mouritsen, 85.), Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen – Rókur av Fløtum Jespersen, Kári Nielsen, Emil N. Leifsson (Páll M. Joensen, 85.) – Jákup á Borg, Jovan Radinovic-Panic, Tór-Ingar Akselsen (Hendrik Rubeksen, 74.)
**Gult kort:** Svenn F. Jacobsen
**GÍ:** Geza Turi – Sam Jacobsen, Kaj Ennigarð, Niclas Niclasen, Magni Jarnskor – Símun Louis Jacobsen (Poul Andrias Jacobsen, 89., Áslakur R. Petersen, Sámal Joensen, Hans Jørgen Djurhuus – Gunnar Nielsen (Sverri Jacobsen, 79.), Poul Arni Jacobsen (Erling Jacobsen, 57.)
**Gult kort:** Símun Louis Jacobsen, Hans Jørgen Djurhuus